LM-017/2020

Annika Petersen

Fra: Jutta í Horni Hansen <jh@betri.fo>
Sendt: 29. januar 2020 14:37
Til: VMR-Journal
Cc: Helgi L. Petersen
Emne: Viðv. uppskot til løgtingslóg um hvítvask - Tykkara Málsnr. 19/000515
Vedhæftede filer: Viðv. uppskot til løgtingslóg um hvítvask.pdf

Góðu tit,

Viðheft er hoyringssvar frá Betri Pensjón P/F til omanfyrinevnda uppskot.

Vinarliga váttið fyri móttøku.

Vegna Betri Pensjón P/F

Blíðar heilsanir | Best regards

Jutta í Horni Hansen
Løgfrøðingur
Stjórnarskrivstovan
jh@betri.fo

betri

Tel. +298 348600 Fax. +298 345601 Beinleiðis. +298 348576 Fartelefon. +298 548576
Betri Trygging, Kongabrúgvin, FO-100 Tórshavn, www.betri.fo

Hugsa um umhvørvið. Prenta bert henda teldupost út, um tað er neyðugt.

Fyrivarni/Disclaimer

Umhvørvis- og Vinnumálaráðið
Gongin 7
Postboks 773
FO-110 Tórshavn
uvmr@uvmr.fo

Tórshavn, 29. januar 2020

Journal nr :
Okkara ref. :
Tykkara ref. : 19/000515

Stjórnarskrivstovan

Betri Pensjón P/F
Kongabrúgvin
FO-100 Tórshavn

Tel.: 348700

pensjon@betri.fo
www.betri.fo

Viðvíkjandi Uppskoti til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin)

Betri Pensjón P/F (hereftir BP) gevur við hesum hoyringssvar til omanfyrinevnda uppskot til hvítvasklóg.

BP hevur ikki nakað nevnivert av viðmerkingum til uppskotið í síni heild, men vilja tó nýta høvi at gera viðmerkingar til einkultar ásetingar í uppskotinum, sum í høvuðsheitum samsvarar við ta donsku hvítvasklógina, við ávísum tillagingum.

Til skjal 1
Víst verður til ásetingina í skjali 1, pkt. 2, a. í *"ikki fullfíggjaða yvirlitinum við faktorum og skjalasløgum, ið eyðkenna støður, sum kunnu hava við sær avmarkaðan váða"*, har tað er ásett:

"Lívstryggingar, har árliga tryggingargjaldið er lágt"

Spurt verður, hvat ítøkiliga liggur í hesum, eitt nú, hvat er skilamarkingin ímillum ávíkavist eitt lágt og eitt høgt tryggingargjald, og í hvørjum førum hevur hetta týdning.

Til § 2, stk. 1, pkt. 4)
Tilvísingin til Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven) skal helst vera § 2, nr. 4, litra a.

- - o - -

Vinarliga

Betri Pensjón P/F

Jutta í Horni Hansen, løgfrøðingur